# Tilmæli um eldrapolitikk

## - trivnaður, tryggleiki og lívsgóðska -

ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

# INNIHALDSYVIRLIT

Fororð ..... 4
Arbeiðssetningur ..... 5
Tulking av arbeiðssetningi ..... 5
Inngangur – Eldrapolitikkur Føroya ..... 7
ST- grundreglur ..... 7
Sjálvræði ..... 7
Luttøka ..... 7
Umsorgan ..... 7
Sjálvsmenning ..... 7
Virðileiki ..... 7
Visjón ..... 8
Avbjóðingar ..... 9
Bygnaður ..... 9
Fólkafrøði (demografi) ..... 9
Starvsfólkatørvur ..... 10
Avbjóðingar og loysnir ..... 10
Loysnir ..... 10
Tænasta ..... 12
Fyribyrging og heilsufremjan ..... 12
Sambandi við umverðina ..... 14
Avvarðandi ..... 14
Sjálvboðið arbeiði ..... 15
Bústaðarviðurskifti ..... 16
Vælferðartøkni ..... 17
Eftirmæli ..... 18
Fylgiskjøl ..... 19
Fylgiskjal1: Arbeiðssetningur ..... 19
Fylgiskjal 2: ST- grundreglur ..... 21

# FORORÐ

Føroya Landsstýri hevur í samgonguskjalinum sett sær sum mál at orða ein eldrapolitikk fyri Føroyar. Samgonguskjalið ásetir, at tað skal

- "setast ein arbeiðsbólkur við m.a. umboðum fyri tey eldru at gera ein eldrapolitikk við heildarætlan fyri innihaldið í tænastuni."

Samgonguskjalið leggur harafturat áherðslu á, at politikkurin og tænastan á eldraøkinum í "størst møguligan mun stuðlar undir lívsgóðskuna og sjálvsavgerðar-rættin hjá tí einstaka."

Í apríl 2012 tók landsstýriskvinnan í almannamálum stig til at seta arbeiðsbólkin, hvørs yvirskipaða uppgáva var at orða ein føroyskan eldrapolitikk.

Í arbeiðssetninginum, sum hevur verið grundarlagið undir arbeiðinum at orða politikkin, er endamálið við politikkinum trífalt:

1. Eldrapolitikkurin hevur sum ítøkiligt endamál, at vera virðisgrundarlagið undir eini komandi rammulóg fyri eldraøktina í Føroyum
2. Eldrapolitikkurin skal orða algildar meginreglur og karmar fyri eldraøkið
3. Eldrapolitikkurin skal verða grundarlag undir samstarvi og samskifti millum avvarðandi partar á eldraøkinum.

Til tess at tryggja hetta felags fatanarstøði á eldraøkinum, varð gjørt av, at arbeiðsbólkurin skuldi mannast við umboðum kommununum og frá teimum fakbólkum og áhugabólkum, sum á ein og annan hátt arbeiða við eldri borgarum.

Arbeiðsbólkurin varð soleiðis mannaður:

1. Gunnleyg Durhuus, Almannaverkið
2. Arne Thorsteinsson og Elisabeth Ellingsgaard, Landsfelag Pensjónista
3. Halldis Joensen, Alzheimerfelagið
4. Ása Holm, Heilsuhjálparafelag Føroya
5. Sunrit Niklasdóttir, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
6. Maibritt Mohr, Heilsurøktarafelagið
7. Marjun Poulsen, Fysioterapeutfelag Føroya
8. Vígdis Nolsøe, Ergoterapeutfelag Føroya
9. Sveiney Sverrisdóttir, Føroya Kommunufelag
10. Eyðun Christiansen, Kommunusamskipan Føroya
11. Jóhan Pauli Helgason (skrivari), Almannamálaráðið

# ARBEIÐSSETNINGUR

Yvirskipaði arbeiðssetningurin[1] hjá arbeiðsbólkinum er at orða eitt uppskot til ein føroyskan eldrapolitikk. Í arbeiðssetninginum er ásett, at eldrapolitikkurin skal orða algildar meginreglur fyri eldraøkið, sum m.a. skulu sláa fast

- at politikkurin skal taka støði í einstaka borgaranum, hansara sjálvsavgerðarrætti og ávirkan á egin viðurskifti
- at politikkurin skal virða, at tey eldru ikki eru ein einsháttaður samfelagsbólkur við einsháttaðum førleikum og tørvi
- at politikkurin skal skapa karmar fyri, at allir eldri borgarar í samfelagnum kunnu liva eitt virkið og innihaldsríkt lív, samstundis sum ein tænasta verður veitt teimum, sum hava brúk fyri hjálp.

Arbeiðssetningurin áleggur eisini arbeiðsbólkinum á yvirskipaðum støði at viðgera, hvussu Føroyar eiga at ganga teimum fólkafrøðiligu avbjóðingunum á møti í mun til eldraøkið. Avbjóðingin liggur í teirri sannroynd, at talið av eldri borgarum er í stórum vøkstri, samstundis sum alsamt færri vera á arbeiðsmarknaðinum. Gongdin merkir ítøkiliga, at tað verða færri skattgjaldarar at rinda fyri m.a. vælferðartænasturnar á eldraøkinum. Til tess at ganga hesi avbjóðing á møti, krevst nýhugsan og ein øðrvísi tilgongd til m.a. tænasturnar á eldraøkinum. Hetta eru spurningar, sum arbeiðsbólkurin yvirskipað verður biðin um at taka støðu til.

At enda verða tað í arbeiðssetninginum nevnd nøkur evni, sum eldrapolitikkurin skal útgreina. Millum hesi eru

- fyribyrging
- bústaðarviðurskifti
- sjálvboðið arbeiði og
- vælferðartøkni

Evnini eru ætlað sum ein leiðbeining til arbeiðsbólkin um, hvat Almannamálaráðið metir at vera týdningarmiklir partar av framtíðar eldrapolitikkinum.

## TULKING AV ARBEIÐSSETNINGI

Við støði í arbeiðssetninginum, hevur arbeiðsbólkurin orðað ein landsfevnandi eldrapolitikk, hvørs málbólkur er eldru borgarar landsins.

Tað eru sera nógv ymisk viðurskifti, sum kunnu verða umrødd, tá tað snýr seg um ein landsfevnandi politikk fyri ein so fjølbroyttan málbólk. Eins og allir aðrir málbólkar, sum verða skilmarkaðir eftir aldrinum, er talan um ein málbólk við ymsari lívsáskoðan, virðum, tørvi, førleikum, bústaði og so framvegis. Politikkurin eigur tí at orðast við hesum í huga.

Arbeiðsbólkurin metir tað ikki vera neyðugt, at eldrapolitikkurin fevnir um øll samfelagsviðurskifti. Í staðin eiga tey eldru, eins og aðrir samfelagsbólkar, at vera fevnd av almenna politikkinum innan mentan, frítíð, arbeiðsmarknað, vinnu o.s.fr.

[1] Sí fylgiskjal 1: Arbeiðssetningur.

Eins og tað er lagt upp til í arbeiðssetninginum, hevur eldrapolitikkurin eitt almannapolitiskt útgangsstøði og savnar hann seg serliga um tey viðurskifti, sum eru knýtt at almennu tænastuni á eldraøkinum.

Serligur dentur er lagdur á tær tænastur og tey tilboð, sum arbeiðsbólkurin metir kunnu styrkja møguleikarnar hjá tí einstaka at liva eitt virkið og innihaldsríkt lív. Harafturat hevur arbeiðsbólkurin lagt dent á at orða ein politikk, sum kann broyta hugburðin til eldri og til tænastuna á eldraøkinum, og sum soleiðis eisini kann vera ein partur av loysnini á teimum avbjóðingum, sum eru fyri framman á eldraøkinum.

Eldrapolitikkurin skal fevna um allar Føroyar. Politikkurin eigur tó ikki at vera avmarkandi í mun til kommunala frælsið at raðfesta á økinum og at leggja tænastuna til rættis á annan hátt. Tí inniheldur eldrapolitikkurin ikki ítøkiligar raðfestingar ella nakað boð uppá, hvussu t.d. tænastur og veitingar eiga at verða fíggjaðar ella veittar. Í staðin verður dentur lagdur á yvirskipaða politikkin, sum tekur støði í teimum avbjóðingum, sum liggja fyri framman, og sum soleiðis kann vera grundarlag undir ítøkiligu politisku raðfestingunum á økinum.

# INNGANGUR – ELDRAPOLITIKKUR FØROYA

Endamálið við at orða ein føroyskan eldrapolitikk er yvirskipað at gera okkum greitt, hvørji mál og mið Føroyar eiga at hava á eldraøkinum; at vera ein leiðbeinari fyri framtíðina. Politikkurin eigur soleiðis at verða útgangsstøðið og grundarlagið undir teimum politisku avgerðunum og teimum tiltøkum, sum frameftir verða sett í verk á eldraøkinum.

Eldrapolitikkurin tekur støði í ST - grundreglunum[2] fyri eldri í heiminum, sum vórðu samtyktar í ST í 1991. Yvirskipað snúgva grundreglurnar seg um sjálvræði, luttøku, umsorgan, sjálvsmenning og virðileika.

## ST- GRUNDREGLUR

### SJÁLVRÆÐI

Eldri borgarar eiga at hava atgongd til grundleggjandi lívsviðurskifti so sum mat, vatn, húsarúm, klæði, heilsutænastur, arbeiði og eitt lív í einum tryggum umhvørvi.

### LUTTØKA

Eldri borgarar eiga at varðveita tilknýtið til samfelagið og at hava ein virknan leiklut í orðing og útinning av politikki, sum viðvíkur vælferð teirra.

### UMSORGAN

Eldri borgarar eiga at hava atgongd til almannatænastur og heilsutænastur landsins, soleiðis at teir kunnu varðveita størst møguliga kropsliga, sálarliga og kensluliga vælveru. Hetta eigur eisini at fevna um fulla virðing fyri teirra tign, trúgv, tørvi og privatlívi.

### SJÁLVSMENNING

Eldri borgarar eiga at hava atgongd til útbúgving, mentan og onnur tilboð í samfelagnum, soleiðis at tey hava møguleika at menna sítt egna tilfeingi mest møguligt.

### VIRÐILEIKI

Eldri borgarar eiga at kunna liva í sóma og tryggleika og at vera viðfarnir rættvíst og virðiliga uttan mun til aldur, kyn, avlamni, fíggjarstøðu ella uppruna.

[2] Sí fylgiskjal 2: ST- grundreglur

# VISJÓN

Visjónin við politikkinum er

- at tryggja teir karmar, sum kunnu stimbra, at eldru borgararnir í Føroyum framhaldandi kunnu liva eitt gott og trygt lív,
- at teir borgarar, sum hava tørv á hjálp, fáa eina dygdargóða tænastu, sum tekur atlit at sjálvsavgerðarrætti og virðileika hins einstaka,
- at stuðla einstaka borgaranum í at vera sum longst í egnum heimi, ella so leingi, hann ynskir tað ella hevur møguleika fyri tí, og
- at byggja brýr millum ung og gomul og harvið styrkja samhaldsfesti millum ættarliðini.

# AVBJÓÐINGAR

## BYGNAÐUR

Seinastu mongu árini er tað vorðið alsamt týðuligari, at ógreiða myndugleikabýtið, sum í dag eyðkennir eldraøkið, er ein av forðingunum fyri menningini og skilagóðum avgerðum á eldraøkinum.

Landið hevur í dag yvirskipaðu ábyrgdina av eldraøkinum, men skipanin við m.a. sjálvsognarstovnum og stuðulsskipanum til útbygging av bútilboðum, er við til at skapa eitt ógreitt uppgávu- og ábyrgdarbýti, bæði millum land og kommunur og millum land og sjálvsognarstovnar.

Við stuðulsskipanunum til bygging av nýggjum eldrasambýlum og røktarheimum, hevur landið latið kommununum stigið til at byggja eldrabústaðir, meðan landið ber nærum allar rakstrarútreiðslurnar. Skipanin hevur m.a. havt við sær, at útbyggingin á eldraøkinum ikki er framd eftir nakrari yvirskipaðari ætlan. Harvið er tænastustøðið innan eldrarøktina eisini ymiskt í ymsu økjunum í landinum.

Landið rindar nærum allan raksturin innan eldrarøktina í dag, men hevur ikki beinleiðis ávirkan á, at íløgurnar til bygging á eldraøkinum verða framdar skynsamt lands-búskaparliga. Heldur ikki hevur landið altíð ávirkan á, hvussu tænastan verður løgd til rættis, t.d. í mun til upptøku á eldrabústøðum, sum eru sjálvsognarstovnur ella har kommunumørk eru. Avleiðingin av hesi skipan er, at tað ikki altíð er borgarin við største tørvinum, sum fær tilboð um búpláss ella umlætting.

Ógreiðu myndugleikaviðurskiftini á eldraøkinum hava ført við sær, at eldraøkið í dag í ávísan mun er eyðkent av vantandi gjøgnumskygni.

Mælt verður tí til, at greiða verður fingin á myndugleikaviðurskiftunum á økinum so vald og gjald fylgist at. Hetta er ein grundleggjandi fyritreyt fyri øktari menning og framtakssemi á eldraøkinum.

## FÓLKAFRØÐI (DEMOGRAFI)

Fólkafrøðisligar framskrivingar vísa, at talið av eldri borgarum kemur at vaksa nógv komandi árini. Í dag eru uml. 6500 borgarar í Føroyum, sum eru omanfyri 67 ár. Framskrivingar vísa, at tað um 20 ár vera út ímóti 11000 borgarar omanfyri 67 ár ella nærum tvífalt so nógvir pensjónistar um 20 ár. Samstundis benda hagtølini á, at samlaða fólkatalið í Føroyum kemur at lækka støðugt í framtíðini og at vit soleiðis eisini verða alsamt færri á arbeiðsmarknaðinum.

Somu framskrivingar siga tó onki beinleiðis um tørvin á almennari hjálp og tænastu í árunum, sum koma, tí hesi viðurskifti eru treytað av heilsustøðuni hjá okkara eldru borgarum. Um vit taka støði í gongdini undanfarnu árini, kann tað væntast, at eftirspurningurin eftir almennum tænastum kemur at hækka í tráð við, at livialdurin hækkar, bæði í mun til nøgd og góðsku. Til dømis verður tað í “framferðarætlanini fyri demens”[3] frá 2012 roknað við, at talið á fólki við demensi í Føroyum er áleið 800 persónar í dag og kann tað væntast, at hetta tal verður tvífaldað um 30 ár.

[3] “Gloymsk, men ikki gloymd” – Framferðarætlan fyri demens í Føroyum, 2012

## STARVSFÓLKATØRVUR

Komandi árini kemur starvsfólkatørvurin á eldraøkinum at vaksa, bæði orsakað av økta talinum av eldri borgarum og orsakað av høga miðalaldrinum hjá starvsfólkunum á eldraøkinum.

Ein kanning frá 2008 vísir, at tey, sum starvast á almannaøkinum, eru munandi eldri enn starvsfólk í øðrum vinnugreinum. Serliga kemur hetta til sjóndar í Heimatænastuni[4], har umleið 20 % av starvsfólkunum vóru í 60-árunum og eldri. Hetta kann samanberast við, at umleið 12 % av arbeiðsmegini í Føroyum er í hesum aldursbólki. Í Heimatænastuna vóru einans 26 % av starvsfólkunum 40 ár ella yngri og heili 31 % av starvsfólkunum vóru í 50'unum.

Gongdin tykist sostatt greið. Miðalaldurin á starvsfjøldini hækkar og yvir eitt ávíst áramál kann tað hava við sær ein vaksandi starvsfólkatørv, sum kann fáa neiligt árin á tænastustøðið í eldrarøktini. Hesin vandin sýnist mest eyðsýndur í útjaðaraøkjunum, har tað lutfalsliga fara at verða fleiri eldri borgarar komandi árini, samstundis sum samlaða fólkatalið í økinum lækkar og at miðalaldurin á starvsfólkunum innan eldrarøktina er hægri enn aðrastaðni í landinum.[5]

Mett verður, at starvsfólkatørvurin á eldraøkinum um heilt fá ár kann verða største einstaka avbjóðingin fyri eldrarøktina, um hond ikki verður tikin um avbjóðingina.

Av tí, at demografiska gongdin hevur við sær stórar avbjóðingar fyri tænastustøðið á eldraøkinum, verður mælt til, at arbeitt verður miðvíst fram ímóti einum fíggjarligum burðardyggum eldraøki, samstundis sum tænastan verður løgd til rættis í mun til eina starvsfjøld, sum støðugt minkar.

## AVBJÓÐINGAR OG LOYSNIR

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at tað ber til at taka við øllum hesum avbjóðingum við eini nýggjari tilgongd til tænastuna á eldraøkinum, samstundis sum tað er neyðugt við eini hugburðsbroyting, bæði í mun til leiklutin hjá tí almenna og í mun til leiklutin hjá einstaka borgaranum.

## LOYSNIR

Hugburðsbroytingin og nýggja tilgongdin á eldraøkinum snúgva seg yvirskipað um, at øll tænasta og allur stuðul grundleggjandi eiga at taka støði í eini

- fyribyrgjandi,
- heilsufremjandi og
- endurmennandi

tilgongd til einstaka borgaran. Somuleiðis er tað avgerandi, at borgarar landsins hava karmarnar, sum gera tað møguligt at taka ábyrgd av egnum lívi og at liva eitt virkið og innihaldsríkt lív.

Tað er somuleiðis týdningarmikið, at tað er greitt fyri øll, hvat er ábyrgd hins einstaka og hvør ábyrgdin er hjá tí almenna. Hin einstaki hevur altíð ábyrgdina av egnum lívi og

[4] Heitið "Heimatænastan" fevnir í kanningini um alt eldraøkið, tað er heimahjálp, heimasjúkrarøkt, økisterapi, røktarheim, eldrasambýli, umlætting, dagtilhald o.s.frv.

[5] Frágreiðing - Starvsfólkatørvur til 2015. Nærverkið. Spf. Damco, oktober 2008

heilsu. Tænastan frá tí almenna eigur sum útgangsstøði altíð at hava sum endamál at gera borgaran føran fyri aftur at megna[6] egið lív.

Sum áður nevnt verður mett, at ein partur av loysnini eisini er at fremja neyðugu bygnaðarbroytingarnar á eldraøkinum, sum kunnu hava við sær skynsamari rakstur og harvið eisini eina betri nýtslu av starvsfólkatilfeinginum. Somuleiðis er neyðugt at leggja dent á at fáa eitt gott arbeiðsumhvørvi, sum tekur atlit til at røktar- og umsorganar-arbeiðið kann vera hart og slítandi fyri bæði kropp og sál.

Tað er harafturat neyðugt at arbeiða við hugmyndini og umrøðuni av eldrarøktini, soleiðis at tað gerst meiri lokkandi hjá nýggjum starvsfólki at velja sína starvsleið á hesum øki.

Ein nýggj tilgongd innan eldrarøktina, sum leggur áherðslu á fyribyrging, heilsufremjan og endurmenning, kann gera sítt til at venda gongdini. Harafturat er tað týdningarmikið at menna eldrarøktina við nýggjari vitan og tøkni, sum verður tillagað føroysk viðurskifti. Umframt at menna eldrarøktina, kann hetta eisini økja um hugin at arbeiða á økinum.

Endamálið við hesum eldrapolitikki, er at geva eitt boð uppá, hvussu vit kunnu taka ímóti teimum avbjóðingum, sum liggja fyri framman á eldraøkinum.

[6] Frá norðurlendska fakheitinum “at mestre”

# TÆNASTA

Málið innan eldrarøktina eigur at vera, at einstaki borgarin altíð fær eina samanhangandi og góða tænastu, sum tekur atlit at tørvi og sjálvsavgerðarrætti hins einstaka. Hjálpin eigur altíð at verða veitt soleiðis, at borgarin verður førur fyri at klára seg so væl sum tilber sjálvur.

Tað verður mett, at umleið 80 % av øllum borgarum omanfyri pensjónsaldur eru frískir og klára seg sjálvar við ongari ella við avmarkaðari hjálp ella stuðli. Yvirskipaða myndin av teimum eldru í Føroyum er, at tað er ein virkin og sjálvstøðugur samfelagsbólkur.

Í tráð við, at livialdurin hækkar, eru tað tó eisini alsamt fleiri borgarar við t.d. varandi sjúkum, og nógvir teirra hava tørv á bæði persónligari og praktiskari hjálp í gerandisdegnum. Tað er týdningarmikið, at hesir borgarar fáa góða umsorgan og røkt sum tekur støði í samleikanum hjá tí einstaka og sum kann styrkja kensluna hjá tí einstaka av at liva eitt gott og trygt lív í ellisárunum.

Tá ein borgari fær tørv á hjálp til at varðveita ella endurskapa eitt virkið lív, er tað ein fyritreyt, at samanhangur er í almennu tænastunum. Einstøku tiltøkini eiga at stuðla hvørjum øðrum soleiðis, at borgarin fær eina samskipaða heildartænastu. Tað er týdningarmikið, at borgarin veit, hvar og hvussu hann kann fáa hjálp frá eldrarøktini, og at atgongdin til tænastuna er løtt og einføld.

Mælt verður til, at tænastan á eldraøkinum verður skipað á ein so smidligan hátt sum til ber og at samband er millum tørv borgarans og tey tilboð, sum borgaranum stendur í boði.

Tað kann vera ein viðbrekin og ótrygg støða at vera noyddur til at taka ímóti hjálp frá øðrum. Tí er tað avgerandi, at hjálpin verður veitt av skikkaðum starvsfólki, sum kunnu veita eina tænastu við høgari fakligari góðsku.

Tað er umráðandi, at skipað verður soleiðis fyri, at eldraøkið verður kent sum eitt starvsøki við dugnaligum og eldhugaðum starvsfólki, soleiðis at starvsøkið verður lokkandi fyri nýggj starvsfólk og harvið støðugt mennist.

## FYRIBYRGING OG HEILSUFREMJAN

Góð heilsa og sjálvbjargni eru grundleggjandi ynski fyri flest øll fólk. Jaliga gongdin seinastu mongu árini hevur verið, at alsamt fleiri eldri fólk hava eina góða heilsu og liva eitt virkið lív. Betri fíggjarligar umstøður og útbúgving eru týdningarmiklar orsøkir, men fleiri viðurskifti gera seg galdandi. Ikki minst broytti lívshátturin eigur ein stóran leiklut eins og viðgerðarmøguleikarnir í almannaverkinum og heilsuverkinum eru vorðnir betri.

Tað kemst tó ikki uttanum, at sannlíkindini fyri, at virkisførið lækkar orsakað av t.d. elli, vælferðarsjúkum ella bráðfeingis sjúku, hækkar við aldrinum og at vit harvið fáa tørv á hjálp. Tað ber tó til at útseta hendan tørvin mest møguligt við at leggja størri dent á fyribyrging og heilsufremjan.

Nógvir møguleikar eru at menna fyribyrgjandi og heilsufremjandi arbeiði í Føroyum og kunnu ágóðanir innan eldrarøktina bæði vera likamligir, sálarligir, sosialir og fíggjarligir.

Fyribyrging og heilsufremjan eiga at vera týdningarmiklir snúningsdeplar á eldraøkinum. Tað snýr seg yvirskipað um at fremja heilsu og trivnað borgarans við tilboðum um rørslu, góðum endurvenjingarmøguleikum og venjingarhentleikum umframt góðum kosti og samveru við onnur. Hetta er við til at økja um sannlíkindini fyri, at hin einstaki varðveitir heilsu og virkisføri longri.

Tað er eins týdningarmikið at stimbra sálarligu heilsuna við fjøltáttaðum og stimbrandi sosialum, handaligum og mentunarligum tilboðum.

Tað er týdningarmikið, at skilt verður millum almenna miðvísa fyribyrgingar- og heilsuátakið, sum kann fevna um allar borgarar landsins, og tað meiri miðvísa fyribyrgingarátakið til fólk við t.d. varandi sjúkum ella mistum førleikum. Samanrenningin millum ein høgan aldur og átrokandi sjúkutrupulleikar kunnu skjótt hava við sær mistan førleika og tørv á hjálp, og er tað tá neyðugt at seta inn stundisliga við røttu viðgerðini.

Kunning er ein sera týdningarmikil partur av fyribyrgingarátakinum. Kunningin eigur at fevna um sunnan kost, royking, alkohol og rørslu. Endamálið við kunningini er m.a. at geva borgaranum eina vitan um, hvussu lívshátturin ávirkar heilsuna, og hvussu stóra ávirkan ein sjálvur hevur, tá ið tað snýr seg um at fyribyrgja sjúku.

Eitt dømi um eitt gott kunningar- og fyribyrgingarátak eru fyribyrgjandi heimavitjanir, sum kunnu brúkast til at kunna eldru borgararnar um sunnan lívshátt eins og borgarin kann vera vístur á viðkomandi tilboð og møguleikar í økinum, sum kunnu styrkja bæði kropsligu og sálarligu heilsuna, sosialu sambondini og harvið trivnaðin hjá tí einstaka.

Mælt verður til, at tað í størst møguligan mun stendur eldru borgarar landsins í boði, at varðveita tilknýtið til arbeiðsmarknaðin, tí hetta er eisini við til at stimbra virkisførleika og heilsu hins einstaka, samstundis sum tilknýtið til arbeiðsmarknaðin er við til at varðveita sosial sambond. Harafturat kann eldra ættarliðið, við sínum royndum og vitan, vera eitt týdningarmikið íkast bæði til arbeiðsplássið og búskapin.

Somuleiðis verður mælt til, at skipað verður soleiðis fyri, at møguleiki verður til staðar at seta í verk eina skjóta sjúkugreinan, viðgerð og venjingar og er tað í hesum sambandi neyðugt við eini samskipaðari heildartænastu millum almannaverkið og heilsuverkið.

# SAMBANDIÐ VIÐ UMVERÐINA

Í øllum eldrapolitiskum átøkum eigur at vera tikið atlit at sosiala sjónarhorninum og hvussu hin einstaki kann stimbrast í at halda viðlíka og menna sambandið við umverðina. Hetta eigur altíð at vera gjørt við støði í bakgrund og tørvi hins einstaka.

Familja, vinir og kenningar hava fyri flest øll fólk ein sera týdningarmiklan leiklut, og er tað týdningarmikið fyri lívsgóðskuna hjá hvørjum einstøkum, at tað er møguligt at varðveita og útbyggja sítt persónliga netverk.

Tað er týdningarmikið, at røktarheim, tilhald og sambýli hava eina heildartilgongd til tænastuna, soleiðis at borgarar, starvsfólk, avvarðandi ella sjálvboðin hjálparfólk kenna seg væl. Tað er týdningarmikið at skapa eitt heimligt umhvørvi, sum hevur tilknýti til umheimin og at virksemið í nærumhvørvinum verður tvinnað saman við gerandisdagin á røktarheimum og sambýlum. Harvið verður eisini møguligt at koma hvørjum øðrum meiri við og at byggja brýr millum ættarliðini.

Gransking vísir, at eisini sambandið við umverðina umvegis tøkniligar miðlar hevur jaliga ávirkan í mun til einsemi hjá tí eldra. Innan eldrarøktina eigur tí eisini at vera hugsað um møguleikarnar fyri at styrkja samskifti og netverkið hjá borgarunum við vælferðartøkni, sum t.d. skype, facebook, telefoni o.s.fr.

## AVVARÐANDI

Seinastu árini er tað innan almannapolitikk og heilsupolitikk vorðið viðurkent, at tað ikki bara eru viðskiftafólk, búfólk ella sjúklingar, sum eru lyklapersónar, hóast hesir hava ein týðandi leiklut. Eisini avvarðandi og starvsfólk eru týdningarmikil, tá hugsað verður um trivnaðin og um eina munagóða tænastu. Hetta ger seg kanska í serligan mun galdandi í Føroyum, sum er eyðkent fyri tøttu familjusambondini.

Tey avvarðandi hava ein týðandi leiklut fyri flest øll fólk, og hjá nógvum eldri borgarum hevur tað eisini týdning at fáa stuðul og hjálp frá einum, sum stendur einum nær, tá avgerð skal takast um t.d. heimahjálp ella at flyta á eitt røktarheim.

Tá eldri borgarar skifta bústað, t.d. inn á eitt røktarheim, mugu tey avvarðandi framvegis hava góðan møguleika til at vera um síni kæru og harvið eisini vera eitt tilfeingi fyri bæði hin eldra og starvsfólkið.

Mælt verður til, at samstarvið við tey avvarðandi, verður ein sameindur partur av eldrarøktini og at hetta samstarv verður kjølfest í ynskjunum hjá báðum pørtum. Tey avvarðandi eiga at verða viðurkend fyri teirra lut í mun til røkt og umsorgan.

Gransking vísir, at avvarðandi at fólki við t.d. demensi eru í størri vanda fyri at verða strongd, tunglynt og at fáa likamligar sjúkur enn vanligt. Harvið kunnu persónligu og samfelagsligu árinini av eini tílíkari sjúku gerast meiri álvarsom, um tað ikki eisini verður hugsað um tey avvarðandi í viðgerðini.

Mælt verður til, at serligt atlit eigur at vera tikið til avvarðandi at sjúklingum við demensi ella aðrari varandi sjúku, sum hava við sær serliga stórar broytingar í gerandisdegnum. Persónmenskan og atferðin hjá einum persóni við t.d. demensi broytist við sjúkuni. Hjá teimum avvarðandi kann hetta vera eitt tungt skifti at fara ígjøgnum, bæði likamliga og sálarliga.

Tað er tí týdningarmikið, so tíðliga sum gjørligt, at veita avvarðandi at sjúklingum stuðul og ráðgeving um sjúkuna.

### SJÁLVBOÐIÐ ARBEIÐI

Føroyar hava eina langa siðvenju við sjálvbodnum arbeiði og ein stórur partur av virkseminum á eldraøkinum, sum í dag eru rótfestar almennar tænastur, eru byrjaðar við sjálvbodnum arbeiði.

Tað sjálvbodna framtakssemi ger seg framvegis galdandi í dag, har eitt stórt og munadygt sosialt arbeiði verður gjørt á eldraøkinum. Hetta er eitt sera gott ískoyti til almennu tænasturnar, sum eigur at verða virðismett.

Oftani savnar sjálvbodna arbeiðið seg um onnur viðurskifti enn almenna tænastan, og umboðar hetta virksemið oftani tað, sum førir við sær lívsgleði, trivnað og felagsskap fyri hin einstaka.

Av tí, at einstaklingar og felagsskapir, sum arbeiða sjálvboðið, ikki eru knýttir at føstum mannagongdum og reglum, sum t.d. kunnu eyðkenna eitt arbeiðspláss, er tað eisini oftani haðani, at nýskapandi loysnir og nýggj rák hómast, sum kunnu geva íblástur til at leggja tænastur v.m. øðrvísi til rættis. Tað er týdningarmikið, at tann vitan, sum er savnað í sjálvbodnum felagsskapum verður nýtt, og at arbeiðið og politikkurin á eldraøkinum verður framdur í samstarvi við hesi feløg.

Sjálvbodnu felagsskapirnir og teir einstaklingar, sum arbeiða sjálvboðið eru eitt sera virðismikið íkast til almennu tænasturnar á eldraøkinum, men hetta eigur tó ongantíð at koma í staðin fyri ta almennu tænastuna.

Tað er týdningarmikið, at tað sjálvbodna arbeiðið verður stuðlað og stimbrað, og fær bestu karmar at virka undir. Tí verður mælt til, at samstarvið og samskiftið millum partarnar á økinum verður styrkt og samskipað betri enn í dag, til gangs fyri borgara, starvsfólk og hin sjálvbodna.

Tað er eisini eitt breiðari samfelagsligt endamál við at styrkja sjálvbodna arbeiði, tí við øktum samstarvi kunnu sosialu átøkini verða styrkt, samstundis sum ein virkin "medborgaraskapur" verður styrktur, og harvið eisini sosiala samfesti í samfelagnum.

# BÚSTAÐARVIÐURSKIFTI

Bústaðarynskini hjá eldra ættarliðinum kunnu ikki bara vera skilmarkað við støði í aldrinum. Eldru borgararnir í Føroyum eru, sum áður víst á, ein samfelagsbólkur, sum er breitt samansettur og kann ímyndin av, hvat eitt gott lív sum eldri er, vera eins fjøltáttað. Ímyndin av góða lívinum er tó oftani tengt at bústaðinum, við tað, at bústaðurin og nærumhvørvið fyri flest øll er eitt fast grundstøði í tilveruni, sum umboðar tryggleika og nærleika. Tey flestu ynskja at brúka síni ellisár í sama bústaði, sum tey í nógv ár hava búleikast í. Tá vit eldast, kann bústaðartørvurin og ynskini tó broytast bæði í mun til innrætting, støðd og nærleika til handilslívið, mentunarlig tilboð og sosial sambond.

Trupulleikin við bústaðarmarknaðinum í Føroyum er, at hann einamest fevnir um størri eigara bústaðir, t.e. sethús, og at fjølbroytni í lívsumstøðunum, sum kunnu standast av hjúnastøðu, aldri ella breki, ikki er endurspeglað á bústaðarmarknaðinum. Bústaðarmarknaðurin er við øðrum orðum ov einsháttaður.

Einsháttaði bústaðarmarknaðurin í Føroyum kann fyri nakrar eldri borgarar vera ein forðing fyri inklusión, virkni og luttøku í samfelagnum, við tað, at borgarar ikki í nóg stóran mun hava valið at flyta í t.d. eina minni íbúð, sum er bíligari og lættari at halda. Í dag er valið hjá hinum einstaka í stóran mun avmarkað millum egið sethús ella røktarheim/eldrasambýli.

Hesin vantandi smidleikin á føroyska bústaðarmarknaðinum kann læsa hin einstaka fastan í eini støðu hann ikki ynskir at vera í, og kann hetta gerast ein óbeinleiðis orsøk til, at tað ikki ber til hjá summum at búgva í egnum heimi so leingi, tey kundu ynskt sær. Sostatt er einsháttaði bústaðarmarknaðurin eisini ein av orsøkunum til, at føroyingar búgva longri á røktarheimi, samanborið við okkara grannalond.

Mælt verður til, at arbeitt verður fyri at fáa ein meiri fjølbroyttan og smidligan bústaðarmarknað í Føroyum, sum kann stuðla málinum um, at eldru borgarar landsins kunnu varðveita sjálvsavgerðarrættin innan teirra egnu bústaðarviðurskifti og hava møguleikan at búgva sum longst í egnum heimi.

Fjølbroytni á bústaðarmarknaðinum eigur at vera galdandi fyri staðseting, ognarviðurskifti (t.d. leiga ella ogn), støðd og innrætting, soleiðis at eldru borgarar landsins fáa ein betri møguleika fyri at búgva í einum hóskandi bústaði, sum tey sjálv kunnu velja.

Bústaðarpolitikkurin á eldraøkinum eigur at taka støði í "bústaðarpolitikki landsins"[7], sum varð almannakunngjørdur í oktober 2012.

[7] http://www.amr.fo/get.file?ID=9759

# VÆLFERÐARTØKNI

Um vit frameftir vilja veita eina nøktandi tænastu á eldraøkinum, krevur tað nýggjar loysnir. Vælferðartøkni kann verða eitt týdningarmikið ískoyti og hjálp til framhaldandi at kunna veita eina nøktandi tænastu innan røkt og umsorgan.

Vælferðartøkni er tøkni, sum verður brúkt til at betra um og at effektivisera tænastur og veitingar í vælferðarsamfelagnum. Vælferðartøkni fevnir um tekniskar loysnir, sum fyrst og fremst stuðla borgaranum í at gerast meiri sjálvbjargin. Tøknin kann lætta um og fyribyrgja sliti og skaðum hjá røktarstarvsfólkum, eins og hon kann effektivisera arbeiðið hjá teimum, sum veita hjálpina ella stuðulin. Hetta kann harvið eisini vera við til at økja um framleidni í samfelagnum.

Vælferðartøkni hevur sostatt bæði einstaklinga og samfelagslig útlit.

Tað er týdningarmikið at gera vart við, at vælferðartøkni ongantíð skal koma í staðin fyri persónliga umsorgan. Endamálið við at nýta vælferðartøkni er hinvegin at gera hin einstaka meiri sjálvbjargnan, at tað skal gera tað lættari at ogna sær nýggja vitan, skapa tryggleika og lívsvirði. Harafturat kann vælferðartøkni verða eitt gott ískoyti innan eldrarøktina, m.a. í mun til praktiska arbeiðið, soleiðis at meiri orka kann nýtast til umsorgan og persónliga nærveru.

Vit eru í dag umgird av tøkni, sum flest øll fata sum ein ágóða. Eins og á øðrum økjum, snýr tøknin á eldraøkinum seg um t.d. sjálvavgreiðslu, fyribyrging og at megna sjálvur. Tøknin kann eisini vera ein hjálp til, at fólk kunnu liva heima sum longst, samstundis sum tey kenna seg trygg. Vælferðartøkni snýr seg soleiðis í stóran mun um at gera borgaran betri føran fyri at taka ábyrgd av egnum lívi.

Tað eigur at verða tikið til eftirtektar, at vælferðartøknin innan eldrarøktina við tíðini helst fer at fáa sama natúrliga leiklut sum í øllum øðrum virksemi í samfelagnum, tað er at gera fólk meiri sjálvbjargin, at økja um framleidni og til at veita eina betri tænastu.

Tøknin eigur at vera jalig bæði fyri tey, sum fáa hjálp og fyri tey, ið veita hjálpina. Nýggja tøknin krevur eina hugburðsbroyting og eina nýggja tilgongd til tænastuna. Til tess, at menningartilgongdin á hesum øki skal eydnast, verður mælt til at bæði borgarar og starvsfólk verða tikin við uppá ráð og eru við í tilgongdini at seta í verk nýggjar loysnir. Hetta kann vera við til at mana møguligar fordómar burtur um tøknina, samstundis sum slóð fyri menning og endurnýggjan innan eldrarøktina í Føroyum kann verða skapt.

# EFTIRMÆLI

Eldrapolitikkurin skal fatast sum ein tilgongd, har endamálið er støðugt at vera kunnugur við menningina og tær avbjóðingar, ið liggja fyri framman á eldraøkinum. Menningin og avbjóðingarnar skifta sum frá líður og eigur eldrapolitikkurin tískil eisini at vera eftirmettur og endurskoðaður við jøvnum millumbilum, soleiðis at eldrapolitikkurin framhaldandi kann vera stevnuberandi grundarlagið fyri arbeiðinum, sum liggur fyri framman á eldraøkinum.

Sum nevnt er í innganginum, er eitt av endamálunum við at orða ein landsfevnandi eldrapolitikk at tryggja eitt felags fatanarstøði hjá politikarum, starvsfólki og borgarum, sum varða av eldraøkinum. Tað er okkara vón, at eldrapolitikkurin varpar ljós á nakrar av teimum grundleggjandi avbjóðingunum, sum liggja fyri framman á eldraøkinum. Samstundis er okkara vón, at politikkurin kann vera íbirtari og vera við til at tryggja tað felags stev, sum ger, at vit megna at taka við teimum avbjóðingunum, sum liggja fyri framman og í felag menna eldraøkið okkum øllum at frama.

# FYLGISKJØL

## FYLGISKJAL 1: ARBEIÐSSETNINGUR

**Eldrapolitikkur**
*Endamál og arbeiðssetningur*

**Endamál**
Í nógv ár hevur tað verið eitt politiskt ynski at gera eina rammulóg fyri eldrarøktina í Føroyum. Ein rammulóg er ein lóg, har lóggevandi valdið tilskilar tær grundreglur, prinsippir og karmar, sum yvirskipað skulu skipa eitt ávíst øki.
Ein fyritreyt fyri at gera eina rammulóg fyri eldrarøktina er sostatt, at vit gera okkum greitt, hvørji virðir og grundreglur skulu vera stýrandi fyri eldraøkið. Við øðrum orðum mugu vit vita, hvat endamálið við eldrarøktini skal vera, ella hvønn eldrapolitikk vit skulu hava?
Tí verður fyrsti liður í at gera eina rammulóg fyri eldrarøktina, at orða ein eldrapolitikk.

Eldrapolitikkurin hevur tó eitt breiðari endamál enn at vera grundarlag undir eini rammulóg fyri eldrarøktina. Endamálið við eldrapolitikkinum er m.a. eisini, at vit sum samfelag yvirskipað gera okkum greitt, hvørjar karmar okkara eldra ættarlið eigur at virka undir og hvussu vit sum samfelag kunnu fáa gagn av teimum førleikum og tí tilfeingi sum tey gomlu hava.

Samstundis sum eldrapolitikkurin skal orða algildar meginreglur fyri eldra ættarliðið, er endamálið við eldrapolitikkinum eisini, at hann verður grundarlag undir samarbeiði og samskifti millum avvarðandi partar innan eldraøkið. Á henda hátt kann eldrapolitikkurin vera við til at skapa eina felags fatan millum avvarðandi partar av teimum avbjóðingum, sum vit hava innan eldraøkið í Føroyum og soleiðis eisini vera savnandi í mun til virksemi innan eldraøkið.

Settur verður ein arbeiðsbólkur at tilevna uppskot til ein eldrapolitikk. Almannamálaráðið leggur arbeiðið til rættis og hevur yvirskipaðu ábyrgdina av tilgongdini, sum skal tryggja, at eldrapolitikkurin verður orðaður í samstarvi við avvarðandi bólkar innan eldraøkið.

**Arbeiðssetningur**
*Høvuðssetningur*
Arbeiðsbólkurin skal orða eitt uppskot til ein føroyskan eldrapolitikk.

Eldrapolitikkurin skal orða algildar meginreglur fyri eldraøkið sum m.a. skulu sláa fast, at politikkurin skal taka støði í einkulta borgaranum, hansara sjálvsavgerðarrætti og ávirkan á egin viðurskifti. Politikkurin skal virða, at tey eldru ikki er ein homogenur samfelagsbólkur við einsháttaðum førleikum og tørvi. Politikkurin skal viðvirka til at skapa eins møguleikar fyri allar borgarar, samstundis sum hond verður tikin um tey, sum hava brúk fyri hjálp og at hendan hjálpin og stuðulin verður veittur við støði í tørvi hins einkulta.

*Undirsetningur*
Føroyar hava, eins og okkara norðurlendsku grannar, eina tvífalda demografiska avbjóðing við fleiri og fleiri borgarum við tørvi á vælferðartænastum og alsamt færri á arbeiðsmarknaðinum, sum kunnu vera við til at fíggja hetta vælferðarsamfelagið. Til tess at ganga hesi avbjóðing á møti, krevst nýhugsan og ein øðrvísi tilgongd til m.a. eldraøkið. Á yvirskipaðum støði skal arbeiðsbólkurin eisini viðgera, hvussu avbjóðingin kann loysast.

Harafturat verður eldrapolitikkurin útgreinaður við støði í hesum fokusøkjum:

- Aktivur aldurdómur
- Bústaðarpolitikkur á eldraøkinum
- Fyribyrgjandi arbeiði
- Rehabilitering
- Sjálvboðið arbeiði
- Vælferðartøkni
- Serstøk føroysk viðurskifti

Listin er ikki troyttur og onnur viðurskifti av týdningi fyri eldrarøktina kunnu sostatt verða løgd afturat í arbeiðstilgongdini.

## Umboð í Arbeiðsbólkinum

- 1 umboð frá Almannamálaráðnum (sekretariat)
- Leiðarin fyri eldrarøktina í Almannaverkinum
- Formaður og næstformaður fyri Landsfelag Pensjónista
- Formaðurin í Alzheimerfelagnum
- Heilsuhjáparafelag Føroya (1 umboð)
- Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar (1 umboð)
- Almanna- og Heilsurøktarafelag Føroya (1 umboð)
- Fysioterapeutfelag Føroya (1 umboð)
- Ergoterapeutfelag Føroya (1 umboð)
- Føroya Kommunufelag (1 umboð)
- Kommunusamskipan Føroya (1 umboð)

## Tíðarætlan

| | |
|---|---|
| Mar. 2012 | Arbeiðssetningur til ummælis og arbeiði í arbeiðsbólkinum fer í gongd |
| Primo Mai 2012 | Endaligur arbeiðssetningur góðkendur |
| Ultimo Mai 2012 | Yvirlitsætlan fyri eldrapolitikkin er klár. Verður viðgjørd av arbeiðsbólkinum |
| Jul. 2012 | Fyrsta uppskot til eldrapolitikk verður viðgjørt |
| Aug. 2012 | Endaligt uppskot til eldrapolitikk er klárt |
| Sep. 2012 | Endaligt uppskot verður handað landsstýriskvinnuni í Almannamálum |
| Okt.-Nov. 2012 | Aðalorðaskifti í løgtinginum við støði í eldrapolitikkinum |

## Fylgiskjal 2: ST- grundreglur

**ST- grundreglur fyri eldri í heiminum**
**Sjálvræði**
Eldri skulu:

- hava atgongd til nóg mikið av mati, vatni, húsarúmd, klæðum og heilsutænastum gjøgnum inntøku, familju, sjálvhjálp og almenn tiltøk
- hava umstøður fyri at arbeiða ella hava atgongd til aðrar inntøkur
- hava møguleika til sjálv at vera við til at avgera, nær og hvussu tey leggja frá sær og taka seg úr arbeiðslívinum
- hava atgongd til at vera við í útbúgving og skeiðvirksemi
- hava møguleika til at liva undir umstøðum, sum eru tryggar og tillagaðar persónliga tørvinum til eina og hvørja tíð
- hava umstøður at búgva heima sum longst

**Luttøka**
Eldri skulu:

- verða verandi við í samfelagnum, vera virkin við í tilevning og útinning av politikki, sum beinleiðis viðvíkur vælferð teirra, og lata yngri ættarlið fáa burtur av kunnleika, dugnaskapi og royndum teirra
- hava umstøður at kanna møguleikar fyri at veita samfelagnum tænastur og hjálp og lata sjálvbodna hjálp á økjum, eldri hava áhuga fyri og evni til
- hava møguleika til at seta á stovn feløg og felagsskapir fyri eldri

**Umsorgan**
Eldri skulu:

- fáa stuðul frá familjuni og samfelagnum, tá tørvur er á umsorgan og verju í tráð við ta skipan, tað einstaka samfelagið hevur og tey mentunarligu virðini
- hava atgongd til heilsutænastur, sum kunnu hjálpa teimum at viðlíkahalda ella vinna aftur kropsliga, andaliga og sálarliga vælveru og fyribyrgja ella seinka sjúku
- hava møguleika til at njóta nøktandi støði á stovnsumsorgan, sum bjóðar tryggleika, endurbúgving, sosiala og mentala stimbran í einum menniskjansligum og tryggum umhvørvi
- hava møguleika til at koma undir mannarættindi og grundleggjandi frælsi, tá tey búgva á stovni, njóta annað slag av umsorgan ella fáa viðgerð, íroknað fulla virðing fyri, at tey skulu taka avgerðir um egna umsorgan og lívsdygd

**Sjálvbragdan**
Eldri skulu:

- hava møguleikar til at menna sítt egna tilfeingi
- hava atgongd til luttøku í útbúgving, mentunarligum, andaligum og afturmennandi tilboðum

**Virðileiki**
Eldri skulu:

- hava møguleika til at liva í sóma og tryggleika, uttan at verða brúkt ella at vera fyri kropsligum ella sálarligum ágangi

- verða viðfarin rættvíst uttan mun til aldur, kyn, rasu ella uppruna, avlamni ella aðra støðu, og verða vird uttan mun til fíggjarstøðu teirra